# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tingfólk vilja ikki lurta

At løgtingið er ein løgin forsamling, hava vit so mangan fingið ein varhuga av. Í dag skuldi løgtingið endaliga samtykkja við triðju viðgerð málið um at leingja flogvøllin í Vágum.

Fyri nøkrum mánaðum síðani leikaðu fleiri tingmenn í, tí ein kanning um framtíðar flogvøll í Føroyum var á gáttini - og teir hildu tað vera skeivt at samtykkja eina útbygging av flogvøllinum í Vágum bara fáar mánaðir fyri, at tann frágreiðing verður almannakunngjørd.

Men hesum fingu teir ikki ljóð fyri – og nú hava fleiri teirra totalt broytt støðu. Bæði John Johannessen og Poul Michelsen fara nú at atkvøða fyri at leingja flogvøllin – og harvið sambært teimum sjálvum at skjóta ein framtíðar flogvøll eini 30-40 ár fram í tíðina. Sjúrður Skaale, sum var so samdur við teimum, er í farloyvi úr løgtinginum fyri at spæla kommediu, so hann hevur slett onga ávirkan á hetta málið, sum hevði so stóran týdning fyri hann fyri nøkrum mánaðum síðani. Hetta hendir so, nú bert tvær vikur eru eftir, til Landsverk fer at almannkunngera frágreiðingina um framtíðar flogvøll.

Nú er tað so, at í fleiri ár eru veðurmátingar gjørdar á Glyvursnesi og í Søltuvík fyri at kanna floglíkindini á hesum støðum. Hendan seinasta tíðin er brúkt upp á at greina upplýsingarnar, sum eru fingnir til vega í hesum mátingunum til tess at vita, hvar ein flogvøllur liggur best, tá ið hugsað verður, vind, turbulens, sýni og regularitet. Og arbeiðið er nú komið so langt, at í seinasta lagi um tvær vikur fæst at vita, hvussu floglíkindini eru á Glyvursnesi og í Søltuvík aftur ímóti í Vágum, segði stjórin á Landsverki við Rás2 í gjár.

Tað er einki ókent fyribrigdi í Føroyum, at ávís viðurskifti ikki skulu diskuterast. Vit skulu ikki diskutera, hvørt vit kunnu klára okkum við einum sjúkrahúsi, tí í Klaksvík og í Suðuroy skapa sjúkrahúsini virksemi. Somuleiðis er við flogvøllinum í Vágum, tað skal heldur ikki diskuterast, tí so endar flogvøllurin bara í Havn. Tað er væl skiljandi, at fólk hugsa soleiðis - og tað er eisini ein erlig sak í sær sjálvum. Men tað ger nú einki, um vit kortini kanna viðurskiftini - tí hvat nú, um tað til dømis ber til at gera ein nógv betri flogvøll á Glyvursnesi ella í Søltuvík? Skulu vit so ikki gera tað?

Tað kann væl ikki passa, at onkur roynir at trýsta flogvallarútbyggingina ígjøgnum løgtingið við beráddum huga, so frágreiðing um framtíðar flogvallarviðurskifti í Føroyum onga árvirkan fær – ella kenna tingfólk úrslitið frammanundan?

**Sosialurin**

## Framtíðarvánir



**KAJ LEO HOLM JOHANNESEN**
Formaður Sambandsfloksins

Vit hava somu avbjóðingar sum øll heimsins lond hava. Ein hóttan kann tó verða, at samgongulimir duga sær ikki hógv, og tað er stórt spell.

Arbeiðið við fíggjarlógini fyri 2011 er longu farið í gongd, og hetta er fyrsta árið, at fíggjarlógararbeiðið byrjar longu í januar.

Seinast í mars mánað kemur landsstýrið við karminum fyri fíggjarlógina.

Vit fara tá at vísa á, hvussu vit fáa tað strukturella hallið burtur í 2014.

Boðini frá fíggjarmálaráðharranum, hvussu hetta kann gerast, tykjast eftir mínum tykki skilagóð, men skulu mýkjast inni í samgonguni, áðrenn endaliga støðutakan. Uppskotið fylgir uppskotinum hjá Búskaparráðnum.

Avbjóðingin hjá okkum er, hvussu vit, bæði á inntøku- og útreiðsluøkinum, fáa 350 mió kr til vega næstu fýra árini. Hetta er tað, sum vit hava lært at kenna sum strukturella hallið.

Í løtuni arbeiða øll ráðini við avbjóðingini um, hvussu tey hvørt í sínum lagi kunnu halda seg innan fyri karmarnar sambært nýggju játtanarlógini.

Sjálvur síggi eg tað soleiðis, at tað eru o.u. 200 mió kr, sum skulu finnast á inntøku- og útreiðslusíðuni.

Málið er, at hallið í 2011 skal vera minni enn í 2010.

**Onnur Fokusøki**

Onkur spyr ivaleyst, hvat ið vit gera við ungdómsarbeiðsloysið, og tað skilji eg væl. Men samgongan hevur gjørt av, at øll ung, sum møguliga einki arbeiði hava, skulu fáa møguleikan fyri eini útbúgving.

Skúlin er eitt spennandi øki, sum skal rationaliserast. Sparingar av hesum arbeiði skulu koma skúlanum til góðar.

Eitt annað, ið vert er at nevna: Reglur skulu gerast fyri verkætlanum, sum verða bodnar út, tí vit føroyingar sjálvir skulu ongantíð vera verri fyri enn útlendingar, sum koma higar. Talan skal vera um fair-play.

ES-bólkurin er liðugur við arbeiði sítt um miðjan mars, og eftir hetta skal avgerð takast um samráðingarleistin.

Viðvíkjandi kommununum, so er gjørt av, at vit 1. januar 2011 skulu vita, hvørjar eindirnar verða, sum verða lagdar saman. Tó verður veruliga samanleggingin ikki endalig, fyrr enn undan næsta kommunustýrisvali.

Vit hava stórar avbjóðingar fyri framman, men tað ber til at koma á mál.

## Nei til at lóggeva kvinnurnar úr Løgtinginum

At venda aftur til fleiri valdømi nú, fer at geva bakslátt í mun til javnari umboðan av kvinnum og monnum á Løgtingi. Hóast framstig eru hend, so liggja Føroyar framvegis í allar aftastu røð tá ræður um javnstøðu í okkara fólkavalda parlamenti.

Í Løgtinginum eru einans 5 av 33, sum er 15%, av umboðunum kvinnur. Vit ynskja eingi stig at taka, sum kunnu fasthalda ella enntá gera støðuna enn verri í mun til parlamentariska undirumboðanina av kvinnum í Løgtinginum.

Vit taka undir við, at ein meting verður gjørd av fyrimunum og vansum við at hava eitt valdømi. Men, at venda aftur til 7 valdømi uttan góðar grundgevingar fyri hesum, er ikki rætta leiðin at ganga. Eitt úrslit av hesum verður púra vist, at tað verður munandi truplari at vinna javnstøðu á tingi. Hetta dokumenterar søga okkara í ólukkumát.

Tað gongur ómetaliga seint at fáa javna umboðan av kvinnum og monnum á politiska pallinum, og vit meta, at gamla valdømisskipanin hevur átt sín part av skyldini. Í gomlu valdømisskipanini var tað so at siga ógjørligt at verða vald á ting, vart tú konufólk og stillaði upp aðrastaðni enn í Suðurstreymi.

Bert einaferð varð kvinna vald í Løgtingið úr Suðuroyar valdømi og bert tvær kvinnur vórðu valdar beinleiðis á ting úr Norðstreymoyar valdømi. Í fýra av gomlu valdømunum varð ongantíð nøkur kvinna vald í Løgtingið.

Í 2004 var kvinnuumboðanin framvegis bert tríggjar av 32, ella 9,4%. Til valið í 2008 vórðu 7 av 33 valdum tinglimum kvinnur – ein búsitandi í Vágunum, ein í Eysturoynni og fimm í Havn.

Sjálvandi ynskja vit so breiða umboðan sum gjørligt – av kvinnum og monnum úr øllum landinum. Men, ein fyritreyt fyri breiðari umboðan er, at kvinnurnar vinna sær munandi fleiri sessir enn í dag. Við einans fimm av 33 ber ikki til at fáa serliga breiða umboðan.

Løgtingið hevur samtykt, at landið skal verða skipað í eitt valdømi. Sostatt hava allir føroyingar í dag høvi at atkvøða fyri tí persóni, tey helst vilja hava at umboða seg á Løgtingi. Skal skipanin broytast aftur, má hetta vera væl fyrireikað, og tryggjast má, at broytingin ikki spennir bein fyri javnstøðu.

Fleiri valdømi nú, fer at tryggja framhaldandi demokratiskum undirskoti av øðrum kyninum á Løgtingi. Hesum taka vit ikki undir við.

**Annika Olsen, landsstýriskvinna, Fólkaflokkurin**

**Annita á Fríðriksmørk, Bjørt Samuelsen og Bergtóra Høgnadóttir Joensen, løgtingskvinnur, Tjóðveldi**

**Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, Eyðgunn Samuelsen og Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinnur, Javnaðarflokkurin**

**Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, Sambandsflokkurin**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.